# Fundarfrásøgn

Skúlastýrisfundur nr 2-2009/10, tann 01. oktober 2009, í Norðskála/Oyrar skúla frá kl 19.00 til kl 21.00.

Fundarluttakarar:

Foreldraumboð: Dávid Reinert Hansen, Nomi á Stongum, Gunnleyg Wang Jacobsen
Kommunustýrisumboð: Elsa Andreasen, Sigrid Christensen
Læraraumboð: Mirjam Zachariasen
Skúlaleiðarin: Sonni Djurhuus

Fundar skrá:

1. Opin mál:
   - uppfylging ísv. parkeringsplássið
   - uppfylging ísv. tryggan skúlaveg
   - uppfylging ísv. málsetning fyri skúlan
   - uppfylging forskúli

   Elsa hevur kunnað kommunnua um ljós á parkeringsplássinum. Tað er eitt ynski um at fáa hetta uppá pláss til veturin.
   Viðvíkjandi tryggum skúlavegi, verður áhaldandi mint á trupulleikan hesum viðvíkjandi. Gongd er á málinum. Dánjal Syderbø skal tosa við Jógvan Waagstein í kommununi um hetta skjótast gjørligt.
   Ferðsla á skúlaplássinum. Tað er sera órógvandi fyri skúlan, tí bilar koyra inná økið í skúlatíð. Skutararnir koyra eisini á skúlaplássinum. Tað verður inniliga heitt á kommununa um, at steingja portrið aftur so bilarnir og skutarnir ikki koyra inn á økið í skúlatíð.Skúlastýrið hevur í áravís arbeitt fyri tryggum skúlavegi og tí er tað ørðkymlandi, at bilar kunnu koyra inni á skúlaplássinum í skúlatíð. Ringast hugsandi er, at næmingar kunnu koma til skaða av hesum.
2. Hølisviðurskiftini: Tað er sent eitt teldubræv til kommununa, tað er einki greitt svar komið, sjálvt um rykt hevur verið eftir hesum tvær ferðir. Tað er sera óheppið at ein hoyrir ting um skúlaskap, uttan at vit blíva informeraði. Skúlastýrið skal vera við í slíkari tilgond. Arbeitt verður við hølistrupulleikunum frá kommununar síðu. Støðan er ikki nøktandi. Kommunnan arbeiðir harliga við hesum. Skúlastýrið ynskir ein formellan fund við kommununa skjótast gjørligt. Skúlastýrið hevur samtykt, at biðja um ein fund við kommunustýrið um álvarsomu støðuna her á skúlanum.
3. Umrøða av framtíðarætlanir við skúlunum í Sunda kommunu
4. Fíggjarætlanin: Er samtykt.
5. Ársætlanirnar: Eru handaðir til skúlastýrið. Ynskiligt er at hava ein árskalendara.
6. Eftirmetingarskjøl: Arbeitt verður framhaldandi við eftirmetingini hjá barninum til heimini. Hetta skjal kann betra um hetta. Hetta er lagt fram fyri skúlastýrið og arbeitt verður við hesum saman við lærararunum.
7. -
8. -
9. -
10. Ymiskt

**1. Opin mál:**